gult cyan magenta svart



# Tvær snøggar náttúruútgávur

*Føroya Náttúrugripasavn hevur latið upp aftur framsýningina og eisini er komin út Føroysk Flora, plakatin Fuglar í Føroyum og kalendari*

DAGFINN OLSEN

Í mong ár hava vit havt Føroya Floru eftir Rasmus Rasmussen.

Í eini 10 ár skrivaði dr. phil Jóhannes Jóhansen, sáli, handrit til nýggja floru. Føroya Skúlabókagrunnur heitti á plantufrøðingarnar Annu Mariu Fosaa, cand. scient. og Siggu Rasmussen, cand. hort., um at fullføra verk Jóhannesar. Nú er stásiliga bókin Føroysk Flora komin út. Við eru allar blómuplantur og leggjastreingjagróplantur, eini 400 í tali. Umframt læntar myndir, hava Astrid Andreasen og Martin Joensen teknað vøkru myndirnar.

Vitjar ein á Náttúrugripasavninum, kann ein umframt at ogna sær bókina, síggja forvitnisliga føroyska botaniska havan, ið har er.

Eisini er útgivin plakat við fuglum í Føroyum. Astrid Andreasen teknaði.

Somuleiðis er komin út kalendari fyri ár 2001, har fuglarnir myndprýða. Samstundis ber til at nýta myndirnar til postkort, ið sostatt eru ókeypis. Kalendarin fæst á vanligum støðum, men eisini, um ein leggur leiðina framvið forvitnisligu framsýningunum á Náttúrugripasavninum.

Til ber eisini at vitja heimasíðna www.ngs.fo, har eisini ein planta er at síggja, ið nýliga er funnin.







*Út er komin stásiliga bókin Føroysk Flora og eisini plakat og kalendari við fuglum*

Har eru planturnar eisini býttar upp landafrøðiliga.

# Summartónar/Atlantsljómur 2000: Johannes Brahms

Johannes Brahms (1833-1897) varð borin í heim 7. mai 1833. Tónleikagávurnar hevði hann frá faðirinum Johann Jakob Brahms, sum ungur var komin úr Ditmarschen fyri at lívbjarga sær fyrst sum strætis- og dansitónleikari og seinni sum kontrabassspælari í býarorkestrinum í Hamburg. Tað var eisini pápin, sum fyrstur legði gávuríka soninum lag á at spæla bæði horn, cello og fiól. Sjey ára gamal fekk Johannes klaverundirvísing frá kendum musikklærara, og gjørdi hann so stór og skjót framstig, at hann longu 10 ára gamal hevði sína fyrstu almennu konsert. Fagnaðurin var óførur, og ferðandi ameriku maður legði pápanum til at koma yvir til Amerika á konsertferð við soninum; men tíbetur fylgdi faðirin hygnu ráðunum frá musikklæraranum ikki at fara.

Fátæksligt var í heiminum og pápin hevði tí sonin við sær út at spæla til ymiskt veitsluhald og á drykkjustovum, og trettan ára gamal og nøkur ár frameftir var hann fastur barrmusikari niðri við dokkirnar í Hamburg. Fátækradømið í heiminum og ólevnaðurin í drykkjustovunum settu sær nívandi og varandi spor í sinnið hjá unga, viðkvæma listamanninum, men samstundis fekk hann við hesum frælsa tónleikavirksemi ment sínar gávur til improvisatoriskt spæl og til at leggja sær skrivaðan tónleik í geyma, ein menning sum seinni kom honum til góðar í konsertsalum víða um í Evropa.

Klaverlærarin hevði stórar vónir um, at Johs. Brahms skuldi gerast heilt framúrskarandi pianistur, men hann helt fyri: "*bara hann kundi hildi uppat at fjasast so við at komponera!*" Tíbetur dugdu lærarin og pápin tó at varnast óvanligu skapanargávurnar, sum búði í unga tónlistamanninum, og fingu honum samband við góðan lærara í teori og komposisjón. Avgerandi týdning fyri Johs. Brahms varð tað, at hann í 1850 kom í samband við fiólleikaran Eduard Remenyi, ið sum politiskur flóttamaður eftir uppreistur í Ungarn kom til Hamburg. Remenyi var ungverji av zigeunarætt, og sambandi og vinskapurin við hann góvu Brahms innlit í ungverskan tónleik, sum við sínum irregileru rytmum, asymetriska taktabýti og sínum rubatospælið (t.e. spæli við skiftandi tempo) komu at seta sín dám á hansara skapandi virksemi. Tónleikaheiti sum "Ungarische Tanze" og "Ziegeunerlieder" bera boð um hesa ávirkan.

Í 1853 fóru hesir báðir ungu menninir Brahms og Remenyi út á konsertferð saman. Frá hesari ferð greiddi Eduard Marxsen, teorilærarin hjá Brahms, m.a. soleiðis frá: *Minnið hjá Brahms var so ómetaligt, at tað datt honum ikki í hug at hava nótar við sær. Fylgispælið til alt tónleikaúrvalið hjá Remenyi, sum fevndi um Bach, Beethoven og hópin av tónleikaverkum eftir Thalberg, Liszt og Mendelsohn, hevði hann í høvdinum."*

Á einari konsert í týska býnum Cello fekk Brahms høvi til at vísa sínar gávur og sítt ótrúliga hegni at snúgva sær á klaverinum. Flyglið var ikki stillað og stóð hálvan tóna ov lágt; men uttan himpr flutti tá Brahms uttanat c-mol sonatu eftir Beethoven upp í cis-moll!

Í Leipzig hittu teir báðir fremsta klaverleikara nítjandu aldar tónaskaldið Franz Liszt, sum bleiv hugtikin av tónleikinum hjá Brahms; men sagt verður at ungi hamburgarin ikki vísti tónleikinum hjá etableraða meistaranum sama áhuga. Av størri týdningi fyri Brahms var tað, at teir eisini hittu gitna fiólleikaran Joseph Joachim, sum hann gjørdist vinur við. Joachim fekk teir at leggja ferðina um Dusseldorf, har Brahms fyrstu ferð hitti Robert Schumann. Meira enn nakar lá hesin samfelagshugaði tónlistamaðurin á takinum at vinna tónleikinum góðar sømdir í Týsklandi og at stuðla uppundir alt dygdargott nýskapandi tónleikavirksemi. Tætt var ímillum stórmeistararnar í 18. øld Bach, Handel, Haydn, Mozart og Beethoven; men eftir deyða hins seinasta í 1827, kendist tað mongum sum eitt tónaskapandi tómrúm, hóast tíðin hýsti úrmælingum sum Schubert, Schumann, Mendelson, Liazt og Chopin. Eftir at hava lært Brahms at kenna skrivaði Schumann eldhugaður í tíðarriti sínum "Neue Zeitschrift f~ur Musik" grein, sum hann kallaði "Neue Bahnen", har hann tekur soleiðis til:

"Hann er komin, ungi maðurin, við hvørs vøggu yndisgudinnur og hetjur standa á varðhaldi. Navn hansara er Johannes Brahms."

Frá degi til annan gjørdist nú navnið Brahms kent víða um í tí týskttalandi tónleikaheiminum; men so hvørt sum hansara tónleikur breiddist út millum manna, býttu tónlistafólk seg í tveir flokkar: tey, sum vóru hugstoytt av,at Brahms ikki royndist tann nýskapandi undangongumaður, sum tey høvdu sett vónir til, og tey, sum vórðu hugtikin av tíðarleysa stórleikanum í hansara tónleiki, sum eisini hevur fingið eftirtíðina at geva honum sæti millum søgunnar allarfermstu tónaskøld.
Brahms dámdi væl at ferðast, kom eisini víða um, og allastaðni vann hann sær vinir, ið tóku sær væl av honum og hansara tónleiki. Teirra millum var gitni tónlistarkrittikarin Hanslick í Wien, sum bæði við sínum ummælum og við praktiskum tiltøkum varð við til at tryggja honum góð kor í hesum heimsins tónleikamiðdepli. Nøkur av fremstu tónlistafólkum um tað mundið tóku tónleikin hjá Brahms til sín og framførdi hann íðiliga á konsertum — nøvn sum áðurnevndi fiólleikari Joseph Joachim, sangarin Julius Stockhausen og pianistar sum Hans von Bulow og Clara Schumann, kona Robert Schumann, ið bæði sum listarfólk, persónsmenska og sum kvinna fekk avgerandi týdning fyri Brahms. Men ikki minst Brahms sjálvur vann sær viðurkenning av sínum tónleiki bæði sum klaverleikari og sum dirigentur. Sjálvur var Brahms eymjúkur í sínari meting av egnum verki. Tá ið hann á fyrsta sinni sá sínar nótar á prenti, helt hann fyri: *Í hesum nýggja skapi tykjast mínir nótar mær so skikkiligir og smædnir. Eg dugi so illa at venja meg við at síggja hesi míni náttúrubørn í so fínum klæðum."* Um sítt komponistavirksemi segði hann einaferð: *" Fólk duga ikki rættiliga at virðismeta tað besta, sum er skapað, at tað er slíkt sum konsertir Mozarts, ið vit onnur liva av og gerast gitin fyri. Hesi fólk áttu at varnast, at tað, sum tey fáa í dropum frá okkum, kunnu tey fródliga drekka frá øðnum"*. Einaferð skipað varð fyri konsert við bara tónleiki eftir Bach, Beethoven og Brahms, kendi hann seg at vera komnan í alt ov hábornan felagsskap. Ikki kundi hann ímynda sær, at júst hesi trý stóru B'ini skuldu gerast eitt serstakt hugtak í tónleikasøguni.



*Um Johannis Brahms verður sagt, at hann serliga í seinni árum kundi loka seg inn í sær sjálvum, vera ringur at koma í samband við.Ongantíð vann hann sær eydnu í ástarlívi*

So við og við streymaðu heiðurstekini inn yvir tónaskaldið Johs. Brahms. Lærdu háskúlarnir í Breslau og í Cambrigde gjørdu hann til heiðursdoktara, hóast hann í fyrsta umfari vísti slíkum heiðuri frá sær. Heimbýur hansara Hamburg, sum í hansara yngri árum hevði lopið hann um við setan av býardirigenti, gjørdi hann umsíðir til heiðursborgara, og fá ár fyri deyða hansara fekk hann Leopold-ordanin og varð kosin limur í listaháskúlanum í París. Hansara viðmerking var tá: *"Eg frøi meg meira um eitt vakurt lag, sum dettur mær í hug, enn um ein Leopold-ordan. Eydnast ein symfoni mær, er tað mær kærari enn nøkur heiðursborgarrættindi."*

Um persónin Johannis Brahms verður sagt, at hann í ungum árum var opin í sinni, eldhugaður og beinasamur, við eitthvørt høvi til reiðar at skapa gleði um seg. Altíð hevði hann bomm í lummanum til børn, hann møtti, og tað var ikki smávegis ómakur, hann gjørdi sær, tá ið talan var um at veita skyldfólkum og vinum hjálp. Myndin, vit hava av honum. har hann eftir arbeiðsdag hevði sína dagligu gongd millum vinir á vínstovum, og ofta sást smásyvjandi við vindeygað í sínari stamcafé, styrkir eisini fatanina av honum sum jovialum manni við einfaldum lívsmynstri. Men tónleikur hansara, ikki minst symfoniirnar, benda á bæði lívsgleði og sálartrega hvørt um annað. Sagt verður eisini, at hann serliga í seinni árum kundi loka seg inn í sær sjálvum, vera ringur at koma í samband við og kundi vera hástórur og spottandi. Sálarfrøðingar hava her hug til at vísa aftur á hansara truplu viðurskifti í barnaárum. Ongantíð vann hann sær eydnu í ástarlívi. Sum áður nevnt fekk samband hansara við hjúnuni Claru og Robert Schumann avgerandi týdning fyri hansara tilveru. Tokki hansara til ta 14 ár eldru frú Schumann gjørdist frá hansara síðu til meira enn vanligan vinskap, men sjálvt eftir brádliga deyða vinmansins, kundi ikki meira koma burturúr. Okkurt samband hevði hann við aðrar kvinnur, men ikki tóktist hann førur fyri at gera nakað álvarsligt burturúr. Í veitslulag skuldi hann einaferð hava øst seg so upp í sinni móti hinum kyninum og hevði brúkt slíkt ókvæmisorð, at samveran datt sundur, og fólk fóru hvør til sítt. Aftaná greiddi hann í sínum vónloysi frá ræðuleikum, hann í barna- og ungdómsárum hevði uppliað í havnarkneipunum í Hamburg. Uppøstur rópti hann: *"Soleiðis upplivdi eg at síggja kvinnukærleikan á fyrsta sinni! Og so vænta tit, at eg skal æra kvinnuna, sum tit siga tykkum gera!"*

Men"harmur og gleði í felag tey reika" ikki bara hjá Johs. Brahms, og tann tónleikur, sum Brahms legði eftir seg, ber meira boð um tað seinna heldur enn tað fyrra. Fyri kórsangarar er tað nakað heilt serstakt at sleppa at syngja Brahms. Hansara tónleikur hevur røtur aftur til fornu meistarar sum Heinrich Schutz og J.S.Bach. Beethoven var hansara stóra symfoniska fyrimynd, men meira enn nakar megnaði hann at sameina ættararvin við tað besta, sum vunnið var fram til á hansara tíð, eitt harmoniskt ríkidømi, sum rættiliga kylir tær í kropp og sál, samstundis sum tað einfalda fólkatónaliga støðugt setir síni merkir á.

Meira enn í nøkrum verki upplivir tú hetta tónleikaliga ríkidømi í verkinum "EIN DEUTSCHES REQUIEM", sum verður framført í Norðurlandahúsinum leygardagin 1/7 og sunnudagin 2/7-2000.

gult cyan magenta svart



# - Takið hóttan frá Greenpeace í álvara

*Nú tað nærkast fyrstu oljueltingá føroyska landgrunninum lúrir hóttain frá Greenpeace. Tað vita skotar alt at siga føroysku grannum sínum. Teirra boð til føroyskar myndugleikar eru tí longu nú at gera allar tær neyðugu fyrireikingarnar til tess at kunna „tacla" Green-peace-aktiónir á rættan hátt*

JAN MÜLLER

Scott Styles er lektari í oljurætti og undivísir á universitetinum í Aberdeen. Hann var her í fjør saman við tí kenda Alex Kemp, professara í oljubúskapi. Fyri stuttumvitjaði hann so aftur her, eitt nú fyri at skapa áhuga millum føroyingar at koma til Skotlands at útbúgva seg. Undir vitjanini tosaði hann m.a. við Fróðskaparsetrið um samstarv. Hann heldur tað vera góður møguleiki hjá føroyingum at fara til Skotlands at lesa víðari. Styles var eisini úti og vitjaði fleiri skúlar fyri at kunna um møguleikarnar at lesa víðari í Skotlandi.

Hann heldur, at Aberdeen kann vera eitt alternativ til eitt nú Keypmannahavn og í fleiri mátar eisini eitt gott alternativ, tí her eru meira hóskandi umstøður.

-Hetta er sjálvandi eitt persónligt val, fyrimunir eru sjálvandi við at fara til Danmarkar, men tað eru so eisini fyrimunir at fara til Aberdeen. Spurningurin um kostnað, nú vit ikki eru partur av ES, er sjálvandi nakað, sum kann tyngja, men ráð eiga at vera fyri tí. M.a. fáa føroyingar, sum lesa í Skotlandi, SU.




### Oljuvinna og góð ráð

Umframt at góðir møguleikar eru at útbúgva seg víðari innan oljufak ber eisini til at lesa enskt og onnur fak við. Hetta var høvuðsmálið við vitjanini, men sum serkønur á oljuøkinum legði Scott Styles eisini leiðina inn til Oljumálastýrið og hitti fólk, sum hava við hesa vinnu at gera.

Scott Styles heldur seg hava ráð at geva føroyingum, nú vit skulu í gongd við eina oljuleiting, og tað er sjálvandi fyrst og fremst á lógarøkinum, eitt nú í sambandi við atgerðir hjá felagsskapum sum Greenpeace móti oljufeløgum.

Herfyri gjørdi Greenpeace seg inn á oljupallar, sum skuldu til at bora eftir olju á Atlantsmótinum men vórðu skjótt steðgaðir av myndugleikunum. Ístaðin fyri at taka Greenpeacefólkini við revsilógini í hondini, so var vanlig borgarlig sak reist móti teimum, og av ótta fyri at fáa risastórar bøtur tóku Greenpeacefólkini seg aftur.

-Áhugaverdi spurningurin fyri tykkum føroyingar er sjálvandi, um Greenpeace í framtíðini fer at gera seg inn á komandi leiting í føroyskum øki. Teir vilja jú steðga allari oljuleiting á Atlantsmótinum, sum Føroyar jú eru ein partur av sigur Scott Styles og vísir á, at føroyingar kunnu rokna við, tá man fer at geva loyvi til at bora, at Greenpeace fer til danskar dómstólar fyri tann vegin at royna at bjóða sjálvum lisensunum av, eins og tað hevur gjørt í Bretlandi. Føroyingar kunnu eisini rokna við, at tá skip og boripallar fara út á føroyska økið at arbeiða, so fer Greenpeace kanska eisini at bjóða teimum av.

Hann vísir á, at tá boripallar fara úr skotskum sjógvi og inn í føroyskan sjógv at arbeiða, tá røkkur lógarinnar armur í Skotlandi ikki so langt. Tvs. at man kann sjálvandi ikki brúka skotska lóggávu til at steðga Greenpeace í føroyskum øki. Tá er tað føroysk lóggáva, sum telur - um nøkur í heila tikið finst.

### Finst føroysk lóggáva?

Scott Styles reisir nevniliga spurningin, um føroyskir myndugleikar í sama mun sum teir skotsku hava nakra lóggávu, sum kann forða Greenpeace at gera seg inn á leiting á føroyska landgrunninum.

Herfyri eydnaðist tað Greenpeace gjøgnum tað sokallaða Habitat direktivið hjá ES at steðga útbjóðingini á bretskum øki inntil víðari. Hóast Føroyar ikki eru partur av ES, so heldur Styles, at vit skulu vera varin, tí hvør veit, um ikki slíkt ES direktiv kortini er galdandi í føroyskum øki eisini, serstakliga tá hugsað verður um, at mong direktiv og reglur hjá ES eisini verða respekterað av londum uttan fyri ES so sum t.d. Føroyum. Og hetta er kanska rættiliga náttúrligt fyri lond, sum eru uttan fyri ES og royna at fáa sær góðar avtalur.

-Eg veit ikki um tað direktivið umfatar Føroyar eisini, men hvussu og ikki, so vil Greenpeace royna at trýsta Danmark, sum er limur av ES til at tvinga Føroya at halda seg til umhvørvislóggávu í ES, sum Danmark eisini er umfatað av.

Styles vísir á, at tá Greenpeace kom við kravinum um, at Habitatdirektivið eisini fevnir um økið uttan fyri 3 fjórðingar og Hægstirættur í London gav teimum viðhald, kom hetta heilt óvantað á bretskar oljumyndugleikar, sum hildu, at reglurnar bara vóru fyri økið út til tríggjar fjórðingar og sostatt ikki fyri alt Atlansmótið.

Styles útilokar ikki, at Greenpeacetiltøk kunnu koma oljuleiting við Føroyar í vanda. Greenpeace hevur brúk fyri einum nýggjum „Brent Spar" fyri at fáa fólk at seta pengar í felagsskapin, og her kann hugsast, at Greenpeace - tá tað ikki hevur eydnuna við sær í bretskum øki - fer at brúka alla orkuna til at steðga fyrstu leitingina við Føroyar. -Spurningurin er tí, um tað finnast føroyskar lógir og reglur, sum kunnu taka við avbjóðingini frá Greenpeace og steðga tiltøkum, ella um her tvørturímóti er eitt rættarligt vacuum. Um so er kann hugsast, at Greenpeace kann forða oljuleiting í mánaðir.

Royndirnar at steðga oljuleitingini frá skotskum havnum herfyri men sum bert vardi í ein dag ella so, vórðu so sanniliga ætlaðar at vara longri. Men av tí at Greenpeace samsvarandi skotskari lóg bar ótta fyri at skula rinda milliónir av krónum í endurgjaldi, góvust teir. Hetta komst av, at rættarskipanin í Skotlandi megnaði at tacla hesi tingini rætt. -Finst ein slík rættarskipan ikki í Føroyum til ta tíð, so beri eg ótta fyri, hvat kann henda. Greenpeace ber ikki ótta fyri, at fólk teirra fara í fongsul. Teir eru meira bangnir fyri at skula gjalda bøtur og endurgjald. Tí ræður um at hava og brúka lógir, sum geva stórar bøtur heldur enn koyra fólk í fongsul.



*Scott Styles ávarar føroyingar móti Greenpeace*

### Rætturin

Hvussu heldur skotski oljuadvokaturin tá, at føroyingar best kunnu fyrireika seg til taka ímóti Greenpeace?

-Tit mugu tryggja tykkum, at lógarskipanin veruliga kann nýtast til at forða Greenpeacetiltøkum, at tykkara heimildir ganga út um vanliga sjómarkið og røkka heilt út á tey økini, har leitað verður eftir olju. Í Bretlandi kunnu vit kalla civilrættin saman eftir tímum, sjálvt á nátt. Eg veit ikki, hvat tit kunnu í Føroyum.

Styles ber ótta fyri, at tað verður lættari hjá Greenpeace at skapa trupulleikar fyri leiting við Føroyar enn við Bretland, tí eru sum sagt hol í lógini, sum Greenpeace hevur funnið fram til og kann brúka, so er uppá tíðina hjá føroyingum at teppa hesi holini so ella so.

Sjálvur ber hann mest ótta fyri, hvat kann henda um Greenpeace fer at spæla út við sínum „Danmarkar korti" sum hann málber seg. Danmark hevur jú eina sterka grøna rørslu, og vit minnast, hvussu Danmark legði harðliga út saman við Greenpeace í Brent Spar málinum móti bæði Hálandi og Týskalandi.

Styles heldur út frá royndunum í Bretlandi, at føroyingar eiga at taka hóttaninar frá Greenpeace í største álvara - longu nú. Greenpeace-fólkini eru sera dugnalig, og áðrenn tú gáar um tað, hava tey sett seg á ein boripall, sum so einki fær gjørt. Hevur man tá ikki lóggávuna at halda seg til, so kann hetta fáa álvarsligar avleiðingar fyri leitingina.

-Eg veit ikki, um Greenpeace fer at gera nakað á føroyskum øki. Teirra styrki er jú, at teir einki siga um hetta frammanundan. Men tað skal undra meg, um ikki Greenpeace, sum jú hevur sett frammaliga á skrá sína at forða fyri oljuleiting á Atlantsmótinum, eisini hevur ætlanir um at skapa trupulleikar fyri leiting við Føroyar, sum jú eru partur av Atlantsmótinum.

Tá vit spyrja Styles, hvat hann heldur um eina komandi oljuvinnu við Føroyar sigur hann, at hon sjálvandi fer at ávirka samfelagið, eitt nú við nógvum nýggjum andlitum í gøtunum.

### Heldur Keypmannahavn enn London

Men hann heldur eisini, at Føroyar hava betri møguleikar at fáa ein ágóða frá hesi vinnu enn t.d. Skotland og Aberdeen, tá hugsað verður um ta vald og ávirkan ávikavist London og Keypmannahavn hava. Styles heldur Føroyar vera í eini betri støðu, og hóast Skotland nú hevur fingið sítt egna ting, so hevur tað ongan myndugleika á oljuøkinum, hann verður framhaldandi í London.

-So meðan stýrið í London ikki hevur viljað latið okkum sjálvar bestemma á oljuøkinum, hevur stýrið í Keypmannahavn verið so lagaligt at lata tykkum allan avgerðarrætt og myndugleika yvir oljuni í tykkara undirgrund.